## Gunnar tók brotsspark

Tað var eitt stórt vónbrot fyri Wrexham, at liðið tapti í fimtbestu ensku fótbóltsdeildini um vikuskiftið. Wrexham spældi ímóti Histon, og dysturin endaði við 1-0 sigri til Histon. Gunnar Nielsen vardi málið hjá Wrexham, og hann gjørdi rættiliga vart við seg, tí hann bjargaði einum brotssparki. Men Wrexham megnaði ikki at skora, og tapið ger tað truplari at røkka einum play-off plássi í deildini.



## Petur dømir á Malta

Petur Reinert verður uppmaður, tá ið U21-landsliðini hjá Malta og Slovenia spæla á Malta týsdagin. Hjálpardómarar verða Jón Kári Frederiksen og Regin Egholm, og harafturat er Eiler Rasmussen eisini við í ferðalagnum. Hann skal verða fjórðidómari. Dysturin millum Malta og Slovenia verður spældur á leikvøllinum hjá Hibernians týsdagin klokkan hálvum trý.

# yvíkina

**FAKTA um dystin**

**H71-Neistin 32-24 (15-14)**
**10 min:** 4-2
**20 min:** 9-10
**30 min:** 15-14
**40 min:** 20-16
**50 min:** 25-21
**Málskjúttar**
**H71:** Dánjal Tórgarð 8 (4), Esbern Patursson 5, Danni Syhler 5, Bárður Brimvík 4, Halgir Dahl Olesen 4, Poul Kjartan Dam 3, Regin Joensen 3
**Neistin:** Ingi Olsen 7, Finnur Hansson 4, Áki Mørk 4, Jugoslav Djumic 3, Birgir Poulsen 2 (1), Jón Ludvík 1, Blagoje Buha 1, Tróndur Kragesteen 1, David Edvardsen 1
**Brotskøst:** H71 4, Neistin 4
**Útvísingar:** H71 4, Neistin 1
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

rygginum, vóru bæði liðini heldur varin og afturhaldin fyrstu løtuna. Fleiri óneyðug mistøk vóru, serliga hjá gestunum. Og tað var orsakað av hesum, at H71 vann sær eina leiðslu upp á trý mál.

Men tá slóð Ingi Olsen til. Við trimum málum upp í slag prógvaði hann, at framvegis er veiggj í hansara 40 ára gamla høgraarmi. Hóast hann als ikki hevur verið regluliga á vøllinum í hesum kappingarárinum, hevði hann ongar trupulleikar at fylgja við og svaraði atfinningunum um, at hann skal ikki skal vera á landsliðnum, tá hann sjáldan er á vøllinum. Men teir bestu eiga pláss á landsliðnum. Í seinna hálvleiki varð vestmenningurin mansvardur, og tá var hugflogið hjá Neistanum burtur.

Liðini fylgdust allan vegin í fyrra umfarinum. Í steðginum var støðan 15-14 til hoyvíkingar.

Í seinna hálvleiki var heimaliðið væl omaná. Skjótt runnu teir undan Neistanum, og so ráddi einamest um at halda fast. Jóhan Hofgaard vardi málið allan seinna hálvleik, og hann var enn eina ferð ein brandur. Fleiri ferðir vardi hann fyri skotroyndunum hjá gestunum.

H71, sum hava havt stór sveiggj í sínum avrikum hetta kappingarárið, stóðu seg væl í gjár. Danny Syhler, Dánjal Tórgarð og Bárður Brimvík royndust eitt nú sera væl. Tá avtornaði høvdu teir vunnið við átta málum, 32-24.

Sigurin í gjár kann fáa stóran týdning fyri hondbóltsfelagið H71. Hoyvíkingar, sum hava verið í skugganum av Kyndli og Neistanum síðan sín stovningardag, hava langt um leingi prógvað, at teir kunnu spæla við. Komandi ættarliðið við millum annað Dánjali Tórgarð, Jóhan Hofgaard og Janusi Sørensen veit nú, at tað letur seg gera og hvat krevst fyri at vinna í avgerandi støðum. Og í øllum feløgum er vinnarahugburðurin grundarlagið fyri øllum gullheiðursmerkjum.

Ingi Olsen, venjari hjá Neistanum, staðfestir aðrastaðni á hesum síðum, at føroyameistararnir neyvan fara at røkka finaluni í ár. Nógv var væntað av liðnum, men tað er sannlíkt, at úrtøkan verður gull í steypakappingini og eitt triðja pláss í landskappingini. Tað prógvar aftur, at tað ikki eru stóru nøvnini, sum vinna hondbóltsdystir.

### Meira enn umráðandi

Fleiri av leikarunum hjá

Kyndil-StÍF 28-21 (11-10)

# Týdningarleysur sigur til Kyndil

**Í einum dysti, sum onga ávirkan fær á endaliga úrslitið, vann Kyndil greitt á StÍF**

HONDBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Tummas Pauli Hanusarson og Bárður Johannesen vóru stóru upplivingarnar, tá Kyndil og StÍF hittust í týdningarleysum dysti í høllini á Hálsi í gjár. Teir stóðu báðir fyri átta málum hvør, tá havnarfelagið vann seg upp á 12 stig í ársins útgávu av landskappingini.

Dysturin var frálíkt høvi at síggja nakrar av framtíðarleikarunum hjá báðum liðunum. Tummas Pauli Hanusarson prógvaði eina ferð enn, at hann eigur eina bjarta hondbóltsframtíð, meðan Torvald Abrahamsen og Andrias Sólsker eisini stóðu seg væl. Besta mansdeildin bjóðaði eisini Juliani Jónsson Johansen vælkomnum á vøllin fyri fyrstu ferð í gjár.

Hóast StÍF legði væl fyri, var Kyndil omaná í størum løtum av dystinum. Famman fyri við einum máli í hálvleikinum, var sannlíkt, at høvuðsstaðarfelagið fór at fáa trupulleikar eftir steðgin. Men soleiðis varð als ikki. Heimaliðið rann skjótt frá gestunum, og tá avtornaði vann Kyndil við sjey málum, 28-21.

Dysturin var uttan týdning, og tí valdu venjararnir at vísa yngru leikarunum álit. Spælið var heldur einki at reypa av sum so, men tað var heldur ikki væntað. Ein tryggur sigur til Kyndil, sum vann seinasta heimadystin á árinum.

**FAKTA um dystin**

**Kyndil-StÍF 28-21 (11-10)**
**10 min:** 3-5
**20 min:** 7-8
**30 min:** 11-10
**40 min:** 18-15
**50 min:** 23-17
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Tummas Pauli Hanusarson 8 (1), Bárður Johannesen 8, Torvald Abrahamsen 3, Hans Arni B. Thomsen 2, Rani Ellingsgaard 2, Hans Áki Dal-Christiansen 2, Andrias Sólsker 1, Julian Jónsson Johansen 1, Janus Einar Sørensen 1
**StÍF:** Jóanes Prestá 6, Cristian Preda 6 (1), Bent Djurhuus 4, Jógvan Berg 2, Hávardur Trúgvason 2, Borgar Danielsen 1
**Brotskøst:** Kyndil 2, StÍF 5
**Útvísingar:** Kyndil 4, StÍF 6
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen

KÍF-VÍF 26-24 (10-15)

# Botnurin vann á oddanum

**KÍF vann við tveimum málum, tá oddaliðið VÍF vitjaði í Kollafirði í gjár**

HONDBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Tá Pætur Johansen økti til 26-24 í seinastu løtu, kundu kollfirðingar fyri bara fjórðu ferð í hesum kappingarárinum frøast um ein sigur. KÍF, sum hevur ligið í tungum sjógvi alt kappingarárið, basti oddaliðnum úr VÍF, sum vitjaði í Kollafirði í gjár.

Eftir fyrsta triðingin av fyrra umfarinum var annars lítið, sum bendi á, at KÍF skuldi vinna sær bæði stigini. Vestmenningar vóru á odda 6-1, og stevndu beint móti enn einum sigri. Stríðshugaðu kollfirðingar royndu at renna aftaná, men munurin var framvegis fimm mál í steðginum, 15-10.

Í seinna umfarinum riggaði betri hjá heimaliðnum, sum vann tryggu leiðsluna aftur frá VÍF, sum var uttan Sámal Joensen og Karl Johan Djurhuus. Í seinastu trimum minuttunum skoraðu kollfirðingar tríggjar ferðir og vunnu harvið 26-24.

Sigurin broytti einki á stigatalvuni, har VÍF framvegis er oddalið og KÍF botnproppur.

**FAKTA um dystin**

**KÍF-VÍF 26-24 (10-15)**
**10 min:** 1-6
**20 min:** 5-11
**30 min:** 10-15
**40 min:** 17-19
**50 min:** 21-22
**Málskjúttar**
**KÍF:** Regin Petersen 5, Rógvi Weyhe 5 (1), Ási Dam 4, Pætur Johansen 4, Pætur Johannesen 2, Niklas Reginsson 2, Tony Weyhe 1, Andrias Nielsen 1, Ingi Johannesen 1
**VÍF:** Bjarti Hansen 5, Agnar Joensen 4 (3), Áki Olsen 3, Niels Andreasen 3, Áki G. Olsen 3, John M. Andreasen 3, Joen P. Høgnesen 2, Sámal Jákup Djurhuus 1
**Brotskøst:** KÍF 4, VÍF 4
**Útvísingar:** KÍF 4, VÍF 2
**Dómarar:** Dánjal Samuelsen & Heri Petersen